# – Fólk mugu skilja ruskið betur

**Tað var ongatíð vandi á ferð, tá eldur brádliga kom í silo'ina á Kommunalu Brennistøðini leygardagin. Hundraðtals bilar sluppu ikki av við ruskið, og vóru menn ikki serliga fegnir um tað**



*Tað sá ógvusligt út, tá eldur brádliga kom í silo'ina á Brennistøðini á Sandvíkarhjalla. Vandi var kortini ongatíð á ferð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

BRENNISTØÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Eldurin í brennistøðini á Sandvíkahjalla kyknaði upp um hálvgum fýra-tíðina, og slakar fýra tímar seinni hevði sløkkiliðið í Havn bast eldinum.

Ein eldur av slíkum slagi hevur onkutíð verið áður, men enn er ikki greitt, hvat orsøkin var til henda eldin leygardagin.

- Vit meta tað tó vera rættiliga sannlíkt, at eldurin er kyknaður av sær sjálvum, sigur leiðarin, Bárður Michelsen við Sosialin.

Orsakað av eldinum í silo'ini varð brennistøðin afturlatin fyri móttøku av ruski fram til mánamorgunin. Hetta kom rættiliga illa við hjá teimum mongu, sum ætlaðu at brúka henda góðveðursdagin til at fáa ruskið beint av vegnum.

Ein rættiliga stórur riðil av bilum mátti tí fara til húsa aftur við ruskinum, og hetta vóru menn sum vera man bæði harmir og illir um. Har var tó einki at gera, tí bingjurnar vóru fullar, og eingin møguleiki var at brenna alt hetta ruskið tann dagin.

Hvat skaðin hevur kostað brennistøðini í er ilt at meta um. Menn frá Tryggingini komu á støðina seinnapartin í gjár at meta um skaðan.

## Roykur og eldur

Brennistøðin er vanliga opin fyri ruski frá privatfólki leygardagar. Teir á brennistøðini høvdu tí fyrireikað seg uppá alt ruskið, sum vanliga kemur ein slíkan dag.

Á middegi var einki rusk í silo'ini, og ætlanin var at byrja við tømingini av bingjunum nakað eftir middagsleitið. Hetta arbeiðið gekk sum tað skuldi, og nakað seinni vóru allar tær fullu bingjurnar á økinum tømdar fyrstu ferð. Ætlanin var síðani at fáa hesar fyltar av nýggjum, áðrenn dagurin var at enda komin.

Men um hálvgum fýratíðina byrjaði brádliga roykur av koma út úr silo'ini, samstundis sum roykurin úr høga skorsteininum hvarv. Tað vísti seg, at eldur var komin í ruskið í silo'ini av sær sjálvum.



*– Vit mugu bara ásanna, at fólk ikki skilja ruskið nóg væl, sigur Bárður Michelsen, leiðari á brennistøðini*
Mynd: Jens Kr. Vang

Á brennistøðini hava teir mannagongdir, tá slíkt hendir. Roynt varð í fyrsta umfari at sløkkja sjálvir. Men tað vísti seg skjótt, at her var talan um størri logar enn so, og tí var bert eitt at gera og boða Alarmsentralinum frá. Teir vóru skjótir á staðið og fingu beinanvegin tamarhald á støðuni, hóast eldurin fyrst varð sløktur um 19-tíðina.

## Skilja betur

Bárður Michelsen sigur, at endamálið við tí vælútgreinaðu móttøkuni av ruskinum, er at fólk sjálvi kunnu skilja ruskið sundur í bingjurnar, sum eru ætlaðar til tey ymisku sløgini av ruski.

Tað er eisini so, at nógv av tí ruskinum sum kemur frá privatum er rættiliga turt og eldfimt, tí tað hevur ligið innandura í styttri ella longri tíð.

- Men vit mugu tíverri ásanna, at fólk ikki altíð skilja ruskið nóg væl. Tað skal ikki so nógv til, at eldur kemur í av sær sjálvum, tá ymisk evni verða blandað saman.

- Bara eitt sindur av lakki ella cellulosu-tynnara saman við einum turrum klúti ella pappíri, kann vera nóg mikið til at eldur kemur í. Tí ynskja vit framhaldandi at minna fólk á tann týdning, tað hevur at ruskið verður væl sundurskilt, sigur leiðarin á brennistøðini.

# Sum sild í tunnu á Fiskivinnuskúlanum

**Nú verður ein endalig loysn funnin fyri Fiskivinnuskúlan í Vestmanna. Gongst sum ætlað verður ein nýggjur skúli klárur at taka í nýtslu um hálvt triðja ár.**

SKÚLAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** Gongur sum ætlað, so kann nýggi fiskivinnuskúlin takast í nýtslu við byrjanina av skúlaárinum 2007.

Sambært uppskotinum hjá Jógvani á Lakjuni hevur hetta málið skund, tí hølistrupulleikarnir eru so átroðkandi at loysa. Arbeiðið við prosjekteringini skal tí byrja longu í næsta mánaði, soleiðis at sjálvt byggiarbeiðið kann byrja í mars mánaði næsta ár.

Kostnaðurin fyri skúlan er mettur til 22 mió. kr., men fyrivarni verður tikið fyri prísbroytingum í byggitíðini. Í kostnaðinum er eingin útreiðsla sett av til útvegan av grundøki, tí Vestmanna kommuna fer at lata grundøkið ókeypis til tann nýggja skúlabygningin.

- Neyðugt er ikki við vegagerð, tí vegur er til økið. Og neyðugt er heldur ikki at keypa leyst innbúgv og framleiðsluútgerð, tí hetta finst frammanundan, upplýsti mentamálaráðharrin í framløguni fríggjadagin.

Kommunan sjálvur hevur ávíst trý øki, sum eru vælegnað til ein slíkan fiskivinnuskúla. Mett verður tó, at best egnaða staðið er við ferjuleguna Inni á Fjørð. Har eru góðir møguleikar fyri útbyggingum í framtíðini, eins og góðir møguleikar eru fyri hepnari byggilist fram við sjóvarmálanum.

## Óhóskandi skúli

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna hevur nú 16 ár á baki. Byrjað varð fyrst í einum sethúsum, ið vórðu umbygd til skúlabrúks.

Hesi hølini vóru tó rættiliga avmarkað, og tí vórðu eini grannahús leigað árið eftir og uppaftur eini í 1994. Hesi bæði húsini verða í løtuni brúkt til undirvísing, hóast tey ikki eru hóskandi til endamálið.

Í mong ár hevur skúlin viðgjørt hesar umstøðurnar, og roynt hevur verið at funnið til aðrar og meiri hóskandi loysnir. Men í 2002 hendi so nakað í málinum, tá ein arbeiðsbólkur varð settur at loysa hølistrupulleikan.

Hesin bólkurin lat úr hondum eitt tilmæli fyri góðum tveimum árum síðani. Her varð týðiliga og greitt sagt, at eingin bygningur fanst í Vestmanna sum var egnaður til ein skúla, og at einasta loysnin tí var at byggja ein nýggjan.

Vestmanna kommuna hevur eisini víst hesum málinum stóran áhuga og hevur tí latið ókeypis grundøki til skúlan, og tí er klárt at fara undir prosjekteringina, tá løgtingið fer at samtykkja málið.

Tingið fer at hava 1. viðgerð av hesum uppskotinum hósdagin í næstu viku.

## Ungar gentur við barn

**Havn:** Í dag, altjóða kvinnudagin, fer Mettustova enn einaferð at vera karmur um eitt tiltak fyri at markera henda dagin.

Nógv tiltøk verða skipað kring allan heimin í dag, m.a. fer Amnesty Føroya Deild at hava tiltøk í Havn og í Runavík.

Men í kvøld fer Mettustova at lýsa eitt evni, sum kanska ikki hevur verið so nógv tosað um. Evnið fyri kvøldið ella í samband við kvinnudagin er "Ungar gentur við barn".

Alt skuldi tala fyri at her verður góð undirtøka til tiltakið.

**sb.**

## Russar veiða nógv mest

**Fiskivinna:** Fyrstu tveir mánaðirnar av árinum áttu skip úr ES-londunum bert ein evarska lítlan part av samlaðu veiðuni undir Føroyum.

Hetta vísir eitt yvirlit yvir útlendska veiðu frá 1. januar og fram til 28. februar. Av teimum 18.500 tonsunum, ið veidd vórðu her, áttu ES-skip bert 318 tons. Nógv tann størsti parturin av veiðuni er framdur av russiskum skipum, sum eiga 16.200 tons av teimum íalt 18.500 tonsunum.

Tað er enn einaferð svartkjafturin, sum telur mest í yvirlitinum. Tí øll tann russiska veiðan í føroyskum sjóøki hevur nettupp verið svartkjaftur.

Annars hava tey fremmandu skipini veitt 94 tons av brosmu, 915 tons av longu og um 170 tons av ávikavist toski og hýsu.

Íalt hava ES-skipini verið 138 dagar í føroyskum sjóøki og onnur skip í 961 dagar.

**sb.**

## Væl vitjað ungdómsstevna

**Ebenezer:** Um vikuskiftið skipaðu tey ungu í samkomuni Ebenezer í Havn fyri árligu ungdómsstevnuni.

Við hesa stevnuna hevði ein sett eina yvirskrift yvir stevna "Hvat er lívið?", og varð hetta lýst á ymiskan hátt í talu, sangi og vitnisburðum.

Rættiliga nógv ungfólk vóru á stevnuni. Fríggjakvøldið og leygarkvøldið mundi talið av fólki vera um 1000 tilsamans.

Leygarkvøldið talaði trúboðarin Símun í Túni. Sum ein part av skránni hetta kvøldið var møguleiki hjá teimum ungu at hoyra um ymiskar felagsskapir, sum arbeiða við kristniboðan úti í heimi. Í einum seinni blaði fara vit at skifta orð við eini hjún úr Klaksvík, sum vóru á hesi stevnuni.

**sb.**